**9.a flokkur**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 6/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011, verður gjørd henda broyting:

Í § 17 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4*. Hóast ásetingarnar í stk. 1 og 3, er loyvt at skeinkja, selja og flýggja út rúsdrekka til persónar, sum eru fyltir 16 ár, um rúmprosentið av alkoholi ikki er meira enn 10."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**
Uppskotið snýr seg um at loyva rúsdrekkasølu til ung yvir 16 ár, har "volumen-styrkin" á seldu vøruni ikki fer upp um 10 %.

Ikki er at taka seg aftur í, at yngri og yngri nýta rúsdrekka. Í verandi støðu fáa tey ikki fatur á rúsdrekka á lógligan hátt og biðja tí onnur keypa fyri seg. Og tá verður helst ov ofta keypt ov sterkt. Vit meta, at ein háttur at forða hesi óhepnu gongd er at loyva sølu av rúsdrekka til ung yvir 16 ár, har "volumen-styrkin" á seldu vøruni ikki fer upp um 10 %.

Hesin møguleiki hevði givið teim ungu eina meir natúrliga tilgongd til tað at nýta rúsdrekka – á lógligan hátt.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Laila Neshamar    Kristina Á. Jakobsen    Elin Kristina Christiansen

Jóhan S. Dahl    Johan Hofgaard    Heimi Edvardsson